# Ólavsøkusúkklingin

**Av misgáum komu úrslitini av ólavsøkusúkklingini ikki við í blaðið eftir ólavsøku**

SÚKKLING
*tíðindaskriv*

Sunnudagin 27. juli varð súkklað kapp á Skálatrøð. Kappast varð hesuferð í Býarsúkkling.

Hjá børnunum var teinurin Vágsbotn, Grím Kambansgøta, Bøgøta, Vágsbotn, og unglingar og vaksin koyrdu ein sindur longri tein – Vágsbotn, Grím Kambansgøta, Sigmundargøta, Vágsbotn.

Børnini kappaðust í trimum bólkum millum dreingir og gentur. Unglingarnir og teir vaksnu byrjaðu eisini saman og koyrdu eisini sama tein.

## Bólkur undir 8 ár

Í hesum bólkinum vóru fimm lutakarar. Teir skuldu koyra fýra umfør og tað vísti seg at vera trupult hjá hinum at koma fram um Jógvan Mellemgaard, sum vann.

**Dreingir:**
1. Jógvan Mellemgaard
2. Sofus Andreassen
3. Ragnar Kruse
4. Vagnur S. Poulsen

**Gentur:**
1. Hildur Poulsen

## Bólkur 9-11 ár

Her vóru eitt sindur fleiri luttakarar og var tað ein hørð kapping millum Finn, Jóhan og Regin men tá síðsta umfar var eftir, gjørdi Finnur ein ordans spurt og kom fyrstur á mál.

**Dreingir:**
1. Finnur Mellemgaard
2. Jóhan Kristiansen
3. Regin Gregoriussen
4. Pætur Dam
5. Høgni Vestergaard
6. Harald Joensen

**Gentur:**
1. Barbara Lervig

## Bólkur 12-14 ár

Í hesum aldursbólkinum vóru tríggir bólkar – gentur og dreingir og dreingir við kappsúkklum. Tað skuldu súkklast átta umfør, tó skuldu teir sum høvdu kappsúkklu, súkkla fyri seg og súkkla tíggju umfør.

**Dreingir á fjallasúkklu:**
1. Andrias Nielsen
2. Niels Christiansen
3. Kári Joensen
Teitur Nielsen (útgingin)

**Gentur:**
1. Sára Olsen
2. Rakul Jakobsen
3. Sólja Christiansen

Hjá dreingjunum sum høvdu kappsúkklu var kappingin sera jøvn. Ein sá at teir vóru taktiskir og dugdu sera væl at súkkla kapp, teir fylgdust øll umførini, men í síðsta umfari bleiv ein spurtur frá síðsta horninum til málið, og Sigmund, sum hevði ført allan vegin, fekk ein væl uppibornan sigur.

**Dreingir:**
1. Sigmund Olsson
2. Rani G. Jakobsen
3. Rúni Bláfoss
4. Poul A. Bláfoss

Hjá unglingum og teimum vaksnu var kappingin 50 minuttir og eitt umfar.

Tey fyrstu umførini megnaðu allir at fylgjast, men aftan á 10. umfar spjaddist riðilin longu. Gunnar og Eli fóru fyri seg, og Lars, Bergur og Hans vóru aftan fyri og royndu at arbeiða seg fram. At enda var ein øgiliga spennandi endaspurtur millum Eli og Gunnar. Teir komu við fullari ferð móti málinum og sum eygað sá var munurin bert eitt hálvt hjól millum Gunnar og Eli. Seinni komu Hans, Lars og Bergur á mál.

**Unglingar:**
1. Hans Krosstein
2. Bergur I. Johansen

**Vaksin:**
1. Gunnar Dahl Olsen
2. Eli Christiansen
3. Lars
Edvard Poulsen (útgingin)





Isaksen's Bussar
44 16 87 - 21 16 87 - 22 16 87

Booking:
Tel. +298 44 16 87
Fax. +298 44 18 87
E-mail: kiki@post.olivant.fo
* FO-660 Søldarfjørður, The Faroe Islands *
Busskoyring – til eitthvørt endamál
Bussar í ymiskum støddum,
frá 10 pers upp til 52 pers.
5 ymiskar støddir + handikaplift.
Vit koyra innan- og uttanlands.
Turist - fótbólt - bindiklubbar - útferðir - leigutúrar
Ring og fá eitt tilboð og hoyr nærri.
Sosialurin 341800

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Koyrt verður leygarkvøld:

| Vágaleiðin (tlf. 217753) | |
|---|---|
| • Sørvágur - Tórshavn | kl. 23.00 |
| • Miðvágur - Tórshavn | kl. 23.15 |
| • Sandavágur - Tórshavn | kl. 23.30 |
| • Tórshavn - Vágar | kl. 04.30 |

| Vestmannaleiðin (tlf. 217752) | |
|---|---|
| • Vestmanna - Tórshavn | kl. 23.30 |
| • Tórshavn - Vestmanna | kl. 00.30 |
| • Vestmanna - Tórshavn | kl. 03.30 |
| • Tórshavn - Vestmanna | kl. 04.30 |

(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254

HOTEL VÁGAR *** THE AIRPORT HOTEL
Hygg her!
AIRPORT STEAK
við kipsi og persillusmøri ella bearnaisesós og broysknum salati
bara 78,-
HOTEL VÁGAR
FLOGFELAG FØROYA
SØRVÁGUR
TEL 33 29 55 - FAX 33 23 10
T-Postur: hotel@ff.fo

HESTPRENT

BØKUR, BØKUR, BØKUR
og alt annað prent
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 314 555
fax 318 026
hestprent@hestprent.fo

fk Mat-seðilin
Hósdagin 7. aug:
Karrygrýta
Fríggjadagin 8. aug:
Enskur Búffur
Leygardagin 9. aug:
Oksasteik
Mánadagin 11. aug:
Gjørd Hara
Týsdagin 12. aug:
Fiskafrikkadellur
Mikudagin 13. aug:
Kókað Oksakjøt
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 20,00
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 28,00
Matstovan í Hoyvík

Ole Ivars

í Høllini á Hálsi
Leygardagin 6. sep. kl. 23-04
Atgongumerkir fáast
í Statoilstøðunum kring landið
og í Kunningarstovuni í Havn
250 kr.
ATLANTIC AIRWAYS · Hotel Føroyar · SMS · STATOIL · FAXE

FRÍGGJAKVØLDIÐ 8. AUGUST
Discoteque
v/DJ LASSE (DK)
KONUFÓLK ÓKEYPIS ATGONGD ÁÐRENN KL. 01:00
LEYGARKVØLDIÐ 9. AUGUST
Discoteque
v/DJ LASSE (DK)
OPIÐ FRÁ KL. 23:00 - 04:00
PLATFORM
discoteque
VINN EINA FERÐ VÁGAR - KEYPMANNAHAVN T/R
INNI Á WWW.PLATFORM.FO
MAERSK AIR

HESA VIKUNA
Fríggjakvøldið
ladies night
kl. 23.00 -01.00
DJ Martin Kjærbo
Leygarkvøldið
DJ Martin Kjærbo
Discoteque er opið:
Hósdag 21-24, fríggjadag 23-04, leygardag 23-04
Discoteque Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 28
www.club20.fo

BÍLEGG PIZZA
FRÍGGJANÁTT
OG
LEYGARNÁTT
HEIMKOYRING ALLA NÁTTINA
PIZZA 67
TEL. 35 67 67

í býin?

Vilt tú bil hýra
- ring 311234
Nú fáast eisini
Talutíðarkort
Føroya Tele
Kall
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
BENZIN
DIESEL
KIOSK
AUTO
311234

FELAGIÐ
TÓRSHØLL
Í vikuskiftinum spæla:
SÓLVA & BERGMENN
Bíligar eindir allar dagar
Sosialurin 341800

í býin?

